Víðka Brandskúlan við Áir

Føroya Brandskúli við Áir verður nú víðkaður til eisini at kunna geva frálæru í at viðgera gasslekar og slíkt, sum stendst av teimum

EDVARD JOENSEN

Nýggja annleggið liggur sunnan fyri Brandskúlan við Áir (Mynd: Edvard Joensen)

Brandskúlin við Áir fer nú eisini at kunna undirvísa í at viðgera gasslekar og fyribyrgja skaðum, sum standast av teimum.

Á økinum, sum Hósvíkar Kommuna eigur sunnan fyri bygningarnar við Áir, hevur Føroya Brandskúli leigað grundstykki, har annlegg til viðgerð av gasslekum nú verður bygt á.

Torfinn Hentze, leiðari á Føroya Brandskúla, sigur, at tað hevur leingi ligið á ljóði, at krøv um hesa útbúgvingina fóru at koma.

Líka leingi hevur Brandskúlin søkt myndugleikarnar her heima um pengar til at gera hetta annleggið fyri.

Nú eru pengarnir játtaðir, og farið er í gongd við byggingini. Arbeiðið skal helst vera liðugt í hesum árinum, sigur Torfinn Hentze.

Talan er um tríggjar sonevndar »atrappar«, sum gerast skulu til undirvísing í at sløkkja eld, sum stendst av gasslekum umframt at viðgera lekarnar sum so.

Tað kann vera so nógv, greiðir Torfinn Hentze frá. At beina ein loga burtur frá einum krana. At køla okkurt rør niður og so framvegis.

Alt slíkt, sum kravt er, at sjófólk skal duga í dag.

Annleggið, sum Brandskúlin nú byggir, er gjørt til at nøkta tey krøv, danskir myndugleikar seta.

Tað er soleiðis, sigur Torfinn Hentze, leiðari á Føroya Brandskúla, at tað ikki nýtist at vera tey altjóða krøvini, ein skal lúka. Tí altjóða krøvini eru altíð tey linastu, sigur hann. Tey eru krøv, øll lond skulu lúka. Síðan kunnu londini hvørt sær seta síni egnu krøv, alt eftir hvussu standardurin í landinum er. Í Føroyum ganga vit eftir donskum krøvum, sigur Torfinn Hentze og leggur aftrat, at:

»...so vita vit, at tey eru í ordan.«

Føroya Brandskúli er fult dagførdur til at kunna geva frálæru í øllum tí, tíðin krevur av sjófólkinum, sigur leiðarin.

Torfinn Hentze sigur, at hetta til nýggja annleggið, nú verður bygt, eru játtaðar 600.000,- krónur.





Vælumtókta H-vindeyga í nýggjum búna

Nýggja H-vindeyga, ið er klætt við aluminium á útsíðuni, gevur framúr viðlíkahalds fyrimunir, samstundis sum umhvørvi og trivnaður innandura verður gingin á møti við límtræði. Nú kanst tú eisini velja millum topp- ella síðusving vindeygu, ið kunnu snarast runt, so tey eru løtt at vaska.

Vindeygað verður liðugt viðgjørt - lakk-sproytað - bæði innan og uttan, síðan verður tað klætt við aluminium í tí liti, tær dámar best.

Ring á 33 21 77 og bið om brochuru og legg summarfrítíðina til rættis!

Vatnsoyra Snikkaravirki pf.

www.h-window.fo

10 ára trygd

stephanssons hús

Skúlaútbygging á Eiði

Skúlin á Eiði verður bygdur út við fleiri serstovum, umframt at ítróttarhøll eisini skal byggjast upp í skúlan

Bygt verður vestur eftir upp í skúlan á Eiði (Mynd: Edvard Joensen)

EDVARD JOENSEN

Á Eiði er arbeiðið við at byggja skúlan út farið í gongd. Byggjast skulu fleiri serstovur umframt ein ítróttarhøll á økinum vestan fyri verandi skúlan.

Eiðis Skúli hevur í fleiri ár verið ov lítil. Serliga hevur tað verið serstovunum, tørvur hevur verið á. Og so hevur verið koyrt eftir kendari skipan við fyribilsloysnum soleiðis og soleiðis.

Nú er ein størri útbygging farin í gongd.

Hans Jacob í Kollsbyrgi, bygdarráðsformaður á Eiði, sigur, at fyrsta byggistig, sum umfatar kloakkarbeiðið og fundamentini til skúla og høll, er komið í helvt.

Útgrevstur og spreinging, sum gjørt er, varð boðið út sum eitt arbeiði fyri seg.

Annað byggistig, ið umfatar innilokan av øllum bygninginum, er boðið út, og tilboðini skulu vera inni mánadagin tann 26. juni.

Væntandi verður alt innilokað einaferð í heyst, og so verður farið undir at gera sjálvan skúlan lidnan. Tað vil siga serstovurnar, meðan ítróttarhøllin verður at bíða.

Ætlanin er, at serstovurnar skulu vera klárar at taka í brúk, tá skúlárið byrjar aftur eftir summarsteðgin komandi ár.

Ætlanin er at gera stovurnar lidnar, og so nýta summarfrítíðina til at binda saman við verandi skúla, soleiðis at skúlagongdin hjá børnunum ikki verður ávirkað av byggingini.

Serstovurnar eru nógvar. Har skal gerast køkur, lívfrøðistova, tónleikastova, bókasavn, handarbeiðsstova við ovni til postalínsbrenning, umframt goymslurúm.

Eisini hava hølisviðurskiftini hjá lærarunum verið sera tronglig, so nýggj lærarastova skal byggjast, eins og fyrireikingarstova eisini verður gjørd til lærararnar.

Tá útbyggingin er gjørd, verður allur verandi skúlin nýttur til vanliga undirvísing.

Hans Jacob í Kollsbyrgi, bygdarráðsformaður, sigur, at væntandi fer alt arbeiðið at kosta eina tíggju milliónir krónur.

Har hjálpti eingin gó›a mamma

PISUFUNDUR. Anna Sofía Hvítklett, sum helt eina skemtiliga HF-rø›u í vi›arlundini í Havn, greiddi frá, at ta› var kravmiki› at ganga á HF í Hoydølum. Men ta› var eisini stuttligt og spennandi, og endamálini vór›u eftir hennara tykki rokkin

HØGNI MOHR

Ta› vóru einføld gle›i og ovfarakæti, sum í størsta mun ey›kendu rø›una hjá 21 ára gomlu Onnu Sofíu Hvítklett, n‡klaktum HF-ara, sum var ein av trimum rø›arum á Pisufundinum ó›inskvøldi›. Og stuttlig var rø›an eisini.

Anna Sofía greiddi frá skelkinum, hon og floksfelagarnir fingu, tá i› kennarin í Hoydølum hev›i gjørt teimum púra greitt, at uppgávurnar skuldu latast inn stundisliga. Annars sluppu tey ikki til próvtøku, hev›i lærarin sagt. Og n‡byrja›u næmingarnir noyddust vi› bivan at sta›festa, at har hjálpti eingin gó›a mamma. Fyrstu vikuna noyddust tey harumframt at endurtaka hart allar uppl‡singar um navn, bú›sta›, yrki, barnatal og um tey vóru gift ella ógift.

Søgan er grundarlagi›

Anna Sofía Hvítklett gjørdi greitt, at støddfrø›in ikki ney›turviliga er t‡dningarmest. Heldur helt hon ta› vera umrá›andi at fáa vi› grundarlagi› av søgu okkara, sum er søgan sjálv, máli›, mentanin og átrúna›urin. Og hon var nøgd vi› frálæruna.

Í søgu, seg›i hon, lærdu vit um fyrstu ni›ursetufólkini; um hvussu tey búleika›ust her á landi, hvussu tey mentust og løgdu lunnar undir ta› samfelagi›, vit kenna í dag.

Tjó›skaparrørslan átti t‡dningarmiklan part av frálæruni í føroyskum. Um birtingarnar millum føroyingar í Keypmannahavn á sinni, seg›i Anna Sofía, at hesir menn, sum harma›ust um vanlagnu málsins, settu sær fyri ikki at ganga hendur í lumma, men heldur at gera eina roynd at bjarga máli og si›um.

Rø›arin sta›festi eisini, at tjó›skaparhugurin aftur birtist í barmi føroyinga. Men hon hev›i einki bo› upp á, hvussu ta› fór at hyldnast á komandi fólkaatkvø›u um fullveldi, í mun til hana í 1946.

Bygdafrell og havnarmenn

Anna Sofía hugleiddi eisini um munin millum bygdafrell og havnarmenn. Í HF-flokkinum hjá henni vóru at byrja vi› nakrir samanbrestir. Havnarfólkini hildu, at bygdafrellini vóru avolda› og bert dugdu at brúka seg. Og bygdafrellini hildu hinvegin, at havnarfólkini vóru yvirlegin og hildu seg liva í heimsins nalva. Men henda spenta stø›a batna›i kortini skjótt. Neyvan hevur hon veri› serliga álvarsom, tí stutt var fráli›i› í fyrsta flokki í Hoydølum, tá i› hesir so ymisku unglingar vóru sum krókur og lykkja.

- Var ein burturstaddur, anna›hvørt drinjandi vágagentan, or›aríki su›uroyingurin ella speiski havnarma›urin, so var vi›komani altí› sakna›ur, og beinanvegin var› spurt til hansara, seg›i Anna Sofía Hvítklett.

Anna Sofía Hvítlkett helt pisurø›una fyri HF´ararnar

Heimurin opin

Ta› var ein gla›ur og vónríkur HF-ari, i› tók saman um tey bæ›i árini á HF. Hon var eisini púra vís í, at málini vóru rokkin og at einki minni enn allur heimurin lá opin fyri teimum nú.

- Pisan er floygd, sta›festi hon.

Fjarskiftissamband vi› sjeymílafer›

I sambandi vi› verkætlanina “Tykissamfelag-Svínoy” hava svínoyingar fingi› fjarskiftissamband á høgum tekniskum stø›i

RÚNAR REISTRUP

Fjarskiftissambandi› millum húsini í Svínoy er vi› verkætlanini “Tykissamfelag-Svínoy” gjørt til eitt ta› mest framkomna, i› er at finna í landinum.

Á hvørjum húsi stendur ein lítil rund antenna, sum syrgir fyri at data kann flytast millum húsini vi› eini fer›, i› á teldumáli kallast 11 Mb/S ella ellivu megabit um sekundi›. Til samanberingar kann nevnast, at fer›in á tí vanliga uppringda sambandinum, i› flestu føroysku internetbrúkarar gera n‡tslu av í løtuni, liggur millum 40 og 50 kilobit um sekundi›.

Fyri at vísa veruliga munin millum hesi bæ›i sambondini kann nevnast, at svíningar vi› sínum innanh‡sis fjarskiftissambandi, kunnu senda ein mi›alstóran MP3 fíl yvir til grannan uppá smá 3 sekund. Sum flestu internetbrúkarar munnu kenna til, tekur hetta munandi longri tí› vi› vanligum uppringdum sambandi.

Langtberandi tráleyst

Í sær sjálvum er ta› einki serligt at kunna senda data ígjøgnum tráleyst samband vi› 11 Mb/S fer›. Ta› serliga vi› útger›ini í Svínoy er, at til ber at senda data vi› hesi fer› um kilometur langar fjarstø›ur. Størsta fjarstø›an, i› sent ver›ur um í Svínoy, er umlei› ein kilometur.

Farodane, sum hevur veitt og sett upp útger›ina, i› nú bindur Svínoyarbygd saman vi› sjeymílafer›, brúkar sjálvt somu skipan til at samskifta millum høvu›sdeildina og skei›deildina, sum liggja í hvør sínum enda av Havnini.

Ta› interna neti› í Svínoy fer um ein servara, i› stendur í oynni, men ver›ur st‡rdur frá Farodane í Havn. Hesin servarin hevur fast samband vi› interneti› ígjøgnum fasta fjarskiftiskápilin til Svínoyar. Vi› tí kapasiteti, sum er settur av til dataflutning á hesum kápli, er fer›in1 Mb/S, so hóast fer›in minkar naka› á veg úr Svínoy, so er talan um rættiliga skjótt samband, i› svínoyingar hava fingi› í samband vi› KT-verkætlanina.

Lesi› meira á s. 11

Costa Dorada

Flogfelag Føroya skipar aftur í ár fyri ferð til gullstrondina í Spania, Costa Dorada. Flogið verður beinleiðis úr Føroyum 7. juli, 21 juli og 4. august.

Gist verður í kenda feriubýnum Salou, ið liggur við stóru Costa Dorada strondina. Beint við liggur tað størsta stuttleikastaðið, Port Aventura, umframt tað stóra "Vatnlandið". Eisini verður skipað fyri útferðum.

Møguleiki er at velja ímillum 3 ymisk hotel ella íbúðir.

Ring ella støkk inn á gólvið og fá meira at vita um hendan frálíka møguleikan.

PRÍSDØMI:
Hotel Michelangelo **+, 2 fólk............. 8.900,- pr. pers.
1/2 pens.
Bólkur min. 10 fólk..... 7.900,- pr. pers.
1/2 pens.

PRÍSDØMI:
Hotel Europa ***, 2 fólk........ 9.100,- pr. pers.
1/2 pens.

PRÍSDØMI:
Íbúð Uolas ella íbúð Aqurio ***, 4 fólk........ 6.800,- pr. pers.

PRÍSDØMI:
Hotel Estival Park ****, 2 fólk......... 10.250,- pr. pers.
1/2 pens.

ÚTSELT 7. JULI OG 4. AUG.

Í øllum prísum er íroknað: Flogferð, ferðaavgjøld og innivist

• Avsláttur fyri børn 2-12 ár: 1.500,- kr. umframt hópin av øðrum avsláttarskipanum. Kom inn og hoyr nærri...

FLOGFELAG FØROYA
Áarvegur 6 • Postboks 3225 • FO-110 Tórshavn
Tel 31 10 25 • Fax 31 86 70 • e-mail: travel@ff.fo

petur & petur • 320870